# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lyfti og játtan

Valstríðið seinast var áhugavert á tann hátt, at fokus skifti støðugt, so hvørt sum vit nærkaðust valinum. Móti endanum á valstríðnum komu mentan og mentanarpolitikkur brádliga í focus, og ávísir flokkar kappaðust um at koma við gyltum lyftum til lista- og mentanarøkið. Leiklistin skuldi blóma og nýtt tjóðleikhús byggjast, filmslist og myndlist skuldu mennast og hava dyggan stuðul, starvslønir skuldu økjast, stovnast skuldi konto uppá fimm milliónir til fremjan av rútmiskum tónleiki. Hjartatátturin í føroyskum mentanarlívi, Mentanargrunnur Landsins skuldi fáa munandi hægri játtan og veruliga gerast tað lokomotivið, sum føroyska mentanarlívinum tørvaði. Mentan skuldi gerast okkara branding uttanlanda og sum heild var eingin endi á tí vælvild, sum flokkarnir fóru at sýna mentanini, um teir fingu makt, sum teir høvdu akt. Ein flokkur signaleraði tað øðvugta, og hesin flokkur situr í dag við formanssessinum í mentanarnevnd løgtingsins, og vit kunnu uttan víðari staðfesta, at hesin flokkur hevur hildið sítt lyfti, tá um mentanina ræður!

Vit hava hildið givin lyfti, sigur landsstýrið í samband við framløguna av fíggjarlógini fyri árið í ár. Hvussu hóska hesi orð til tað økið, sum fekk flest lyfti í valstríðnum, nevniliga mentanina? Jú, leiklistin hevur fingið eina súmbolska hækking. Mentanargrunnurin fær ikki eitt klovið nýtt oyra, tónleikur er óbroyttur. Stovnarnir, sum røkja mentanararvin skríða framvegis í skræðuni, og her er einki broytt uttan játtanin til Norðurlandahúsið, sum Norðurlendski ráðharrastovnurin eigur og útbyggir, soleiðis at vit eru noydd at fylgja við. So kunnu lesarin og ikki minst mentanarfólkini meta, hvørt henda nýggja samgonga hevur hildið síni vallyfti. Miðflokkurin hevur í hvussu so er hildið síni lyfti, tá um mentanina ræður. Lagt kann her verða afturat, at lyftini til gransking flugu ikki lægri enn lyftini til mentanarøkið. Her var snøgt sagt eingin endi á vælvildini, og tí man tað kennast ikki sørt snópisligt hjá mongum, ar Granskingarrunnurin ikki hevur fingið eitt klovið oyra í hækking. Hvat siga granskararnir? Hvat sigur ES?

Nú kann sjálvsagt verða sagt, at hetta er grenji, tí vit hava havt so stutta tíð at gera fíggjarlóg, at hon bert kemur í gildi nakrar mánaðir. Tað er nakað um hetta, víst so. Hinvegin finst eitt hugtak, sum nevnist signalvirði. Signalvirðið í hesum fíggjarlógaruppskoti er ikki at fara skeivur av. Tað sæst ikki minst av teimum kontum, sum veruliga hava fingið munandi hægri játtan í ár í mun til 2007. Vit fara at hyggja at hesum kontum í morgin og samstundis fara vit at umrøða signalvirðið í hesum áhugaverdu hækkingum.

**Sosialurin**

## Sosialurin ósannindi upp á 39,65 mió viðvíkjandi Farex



**KAJ LEO JOHANNESEN**
Nevndarformaður

Stendur í grein í Sosialinum í dag, at Farex hevur eina skuld uppá 40 mió kr í roknskapinum fyri 2006, men tað verður einki nevnt í greinini, at sama fyritøka eisini hevur eina ogn uppá 37,61 mió krónir.

Fyri at rætta hesu roknskapargjøgnumgongd hjá Kára Mikkelsen, so kann staðfestast, at roknskapurin hjá Farex vísir eina stuttfreistaða skuld ultimo 2006 uppá 37,96 mió kr og eina ogn upp á sum sagt 37,60 mió kr, tað vil siga, at um nakar seriøsitetur hevði verið í hesi grein, hevði redaktørurin á Sosialinum komið til ta niðurstøðu, at skuldin var munurin millum ogn og skuld nemliga 352.000 kr.

So kann lesarin sjálvur gera eina meting, um tað er nakar munur, at Farex hevur eina skuld uppá 40 mió kr við árslok 2006 ella 352 tús kr.

Eg veit ikki, hvørjum bili Kári Mikkelsen koyrir í privat og hvør fíggjar bilin, men vónandi koyrir hann væl og er nøgdur við bilin, og tað hevur sum so einki við Sosialin at gera.

Mín privatbilur er ein Honda Jeepur sum ikki kostaði bert " 350.000" kr men 329.000 kr og hann riggar væl.

Í staðin fyri at myndamaður hjá Sosialinum snýkir seg runt uttanfyri hjá Farex og tekur myndir av bygningum og bilum, so vil eg við hesum bjóða bæði myndamanni og Kára Mikkelsen at koma innar til ein kaffimunn.

## Nú flytur tú fokus, Kaj Leo



**KÁRI MIKKELSEN**
redaktiónsleiðari

**Aftursvar**

Fyrst vil eg afturvísa, at nakar feilur er í greinini í gjár. Og tá onki er at koma eftir, hvat ger man so, Kaj Leo? Jú, flytur fokus, og tað er hetta, tú gert við at pástanda, at eg komi við ósannindum.

Fyri at halda meg til pointið í greinini, so er tað hetta, at samstundis sum Farex er í álvarsligum gjaldføristrupulleikum, koyra tveir av trimum eigarum – har tú IKKI ert ein av teimum – í bilum sum kosta ávikavist 750.000 og 770.000 krónur, og at annar teirra, sum er stjóri í felagnum, hevur bílagt ein nýggjan bil fyri 1,1 mió. krónur. Tað er hendan andsøgnin millum neyðlíðandi fyritøkuna og atburðin hjá eigarunum, ið søgan snýr seg um, og ikki nakað roknskapartekniskt um at onki kemur fram um, hvat ognirnar hjá felagnum eru. Tá eg vísi á, at skuldin í Farex við árslok 2006 er slakar 38 mió. krónur (nágreiniliga talið er 37,968 mió. krónur) og eginpeningurin er negativur við 352.000 krónum, so kunnu teir flestu lesarar rokna út, at ognin er 352.000 krónur minni enn skuldin. Við øðrum orðum, at Farex hevur eina bókaða ogn upp á góðar 37,6 mió. krónur.

Tú ert sjálvandi vælkomin at vísa mær roknskapin fyri 2007, so kunnu vit seta okkum niður yvir handan kaffimunnin, sum tú ert so beinasamur at bjóða mær og myndamanninum, meðan vit gjøgnumganga tølini. Hesin roknskapurin er sjálvandi meiri áhugaverdur, tí hann er nýggjur og fortelur meir um teir fíggjarligu trupulleikar, sum fyritøka tykkara hevur í løtuni.

Tú sigur teg ikki vita, hvørjum bili eg koyri í, og hvør fíggjar hann. Tað vil eg fegin upplýsa tær. Eg koyri í einum Hyundai Matrix 1,6, sum kostaði 178.000 krónur, tá hann varð keyptur í september 2006. Ein frálíkur bilur, sum ongin fíggjar, tí hann er útgoldin.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.